Frá Barnagarðinum á Teiginum á Sandi:

# Pedagogar

Vit sóknast eftir 2 pedagogum. Størvini verða sett 15. november, 2007. Talan er um ávíkavist eitt fast starv 30 tímar um vikuna og eitt barnsburðarfarloyvisstarv í 25 tímar um vikuna í 3 mánaðir.

**Krøvini til tín eru:**

- at tú er fyrikomandi og erlig/ur
- at tú dugir at arbeiða sjálvstøðugt og ábyrgdarfult í samráð við børn og starvsfelagar.
- at tú heldur arbeiði við 0-9 ára gomlum børnum vera spennandi og avbjóðandi.
- at tær dámar at verða úti í øllum veðrið.
- at tú dugir at síggja møguleikar heldur enn avmarkingar.
- at tú er nærverandi og dugir at lurta.
- at tú vil verða við til at menna barnagarðin og tað arbeiði vit hava sett okkum fyri.

Størvini verða lønt sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og KAF/Fíggjarmálaráðið. Arbeiðstíðin er vanliga millum kl. 7.30 og 17.30.

Tú fært nærri upplýsingar um størvini, um tú vendir tær til Lailu Marston Petersen, stovnsleiðara á tlf. 361750/212751.

Skrivlig umsókn við møguligum viðmælum, skal sendast til Sjálvsognarstovnin Barnagarðin á Teiginum, Koytugøta 1, 210 Sandur. Umsóknarfreistin er úti 31.10.07. Allir umsøkjarar fáa svar.

**Sjálvsognarstovnurin**
**Barnagarðurin á Teiginum**

# Frá Sláturmiðstøðini

**Vit hava yvirtikið arbeiðið hjá AG – Kjøt á Toftum**

Vit eru byrjaðir at fletta, so um tú ikki hevur tíð og orku, so eru vit til reiðar at hjálpa tær, óavmarkað nøgd.

Eisini er møguleiki at bíða, ímeðan flett verður.

Vit kunnu eisini skipa fyri flutningi, um tað er neyðugt.

Skjótt og væl úr hondum greitt.

**Ring: 21 67 47 ella 28 67 87**

**Sláturmiðstøðin**
Fjøruvegur 1 · 785 Haraldssund

# Handilsbygningur til sølu

Handilsbygningur við Klaksvíksveg 34 til sølu, um hóskandi boð fæst. Bygningurin er í trimum hæddum og hvør hædd er $48m^2$.

**Tlf. 456428 ella 220606**

## Frá Havnar Róðrarfelag

**Eyka aðalfundur verður mikudagin 24. oktober 2007 klokkan 18.00. Skráin er:**

1. Val av fundarstjóra.
2. Val av grannskoðara.
3. Framløga av granskoðaum ársrokniskapi 2006 til góðkenningar.
4. Val av eykalimum.
5. Ymiskt.

Allir limir felagsins – bæði rógvarar og limir annars – eiga at møta á eyka aðalfundinum.

**Vinarliga**

**Havnar Róðrarfelag**
**Nevndin**

## HÚS Í SKOPUN TIL SØLU



Ognin matr.nr. 422, Skopun verður hervið lýst til sølu.

Talan er um eini sethús í tveimum hæddum, og er grundøkið 535 $m^2$. Húsini eru bygd í 1983.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Jóhan J. Lamhauge, advokat, jjl@lawfirm.fo ella á heimasíðu okkara www.lawfirm.fo

ADVOKATFELAGIÐ VIÐ STROND 4
YVIRI VIÐ STROND 4 · TEL 311260 · FAX 311261 · P.O. BOX 359
FO-110 TÓRSHAVN · FAROE ISLANDS
EMAIL: LAWFIRM@LAWFIRM.FO
**HEIMASÍÐA: WWW.LAWFIRM.FO**

TORMÓÐUR DJURHUUS · JÓGVAN PÁLL LASSEN · PETUR EVEN DJURHUUS
JÓGVAN E. ELLEFSEN · ANNA DAM · INGI HØJGAARD · JÓHAN J. LAMHAUGE
GUNN ELLEFSEN · MIMI STEINTÓRSDÓTTIR

## LÆRARAR TIL KOLLAFJARÐAR SKÚLA

Søkt verður eftir lærara at byrja 1. nov. 2007

Starvið er fulltíðarstarv, ið er sáttmálasett og tíðaravmarkað skúlaárið út.

Í Kollafjarðar skúla ganga 136 næmingar í 1. til 9. flokki.

17 lærarar at starvast í skúlanum.

Kollafjarðar skúli er ein eitt-sporaður skúli við 9 árgangum.

Vit arbeiða í trimum deildum við einum læraratoymi í hvørjari deild.

Býtt er soleiðis: 1.-3. flokkur, 4.-6. flokkur og 7.-9. flokkur.

Vit sóknast eftir lærara, ið kann átaka sær undirvísing í kristni í 2. og 3. flokki, føroyskum í 3. flokki, telduundirvísing í 4.-6. flokki og nakað av serundirvísing. Eisini má lærarin helst kunna átaka sær at vera telduvørður.

Tann, ið settur verður, skal hava læraraútbúgving. Tó kann annað fólk verða sett, um eingin lærari søkir.

Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1 – 27.4.

Umsókn saman við CV, avriti av prógvum og møguligum viðmælum, verður at senda til:

**Kollafjarðar skúla**
Botnavegur 2
FO-410 Kollafjørður

í seinasta lagi mikudagin 24. oktobur 2007 kl. 12.00.

Eru spurningar, eru tit vælkomin at venda tykkum til skúlastjóran, Karin Hammer, á tlf. 30 25 53 ella 22 14 07 ella á t-posti karin.hammer@skulin.fo

## Fiskamerki

Seinasta freist at lata fiskamerkir, sum skulu luttaka í lutakasti um 10.000 kr., er 12. oktober.

FISKIRANNSÓKNARSTOVAN
FAROESE FISHERIES LABORATORY
Postrúm 3051, Nóatún
110 Tórshavn, Føroyar
Telf. (298) 353900
Telefax (298) 353901